# HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

22. mars 2017
**Mál**: 16/00854-8
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

*Góðkenningarskriv*

**Viðvíkjandi broyting í byggisamtyktini fyri Kollafjørð, á Langasandi**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 1. juli 2016, sent uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Kollafjørð til góðkenningar.

Broytingin snýr seg um, at ognirnar matr. nr. 238a, 238b, 239 og 236 í Kollafirði, á Langasandi verða broyttar frá B2-havnarøki til B3-vinnuøki.

Grundgevingin fyri ætlaðu broytingini er, at nevndu øki verða brúkt til m.a. parkeringspláss, goymsluhøll og handilsvirksemi, og ongantíð eru brúkt til virksemi í tráð við galdandi byggisamtykt, og at ongar ætlanir eru um tað.

Broytingin havur ligið alment frammi frá 17. mai. til 7. juni 2016. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 28. juni 2016, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 5. september 2016, mælt til at broytingin verður góðkend.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum í ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir at at ognirnar 238a, 238b, 239 og 236 í Kollafirði, á Langasandi verða broyttar frá B2-havnarøki til B3-vinnuøki.

Mint verður á, at hóast ein byggisamtykt er góðkend av ráðnum, so sleppur kommunan ikki undan at tryggja at øll onnur loyvi vera fingin til vega, áðrenn farið verður undir at byggja, til dømis frá friðingarmyndugleikanum, sum sambært aðrari lóggávu kann seta krøv til bygningar

Hjálagt rættað kortskjal fyri Kollafjørð við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo




| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/00854 |
| Ætlanarskriv: | 14/10-2016 |
| Góðkent: | 22/3 2017 |
| Váttað: | [signature] |

**4. GRUNDUMRÁÐI**

**3. GRUNDUMRÁÐI:**

- A1: Lág bústaðarbygging
- A3: Blandað bústaðarbygging
- B1: Havnaøki
- B2: Havnaøki
- B3: Vinnuøki
- C1: Tøtt miðstaðarbygging
- C2: Opin miðstaðarbygging
- C3: Miðstaða- og bústaðabygging
- D1: Frílendi
- D2: Ítrottarøki
- D3: Almennir stovnar
- E: Smábáta- frítíðar og ítrottarvirksemi
- N: Ikki avgjørt

# Byggisamtykt fyri Kollafjørð

Seinast broytt: 02.11.2016

TÓRSHAVNAR BYRÁÐ